## Wall Street fær kapping

Wall Street í New York er kent sum heimsins fíggjarnalvi, men nú fær tann kendi miðdepilin harða kapping frá bretska virðisbrævamarknaðinum London Stock Exchange. Orsøkin er, at fleiri fyritøkur eru rýmdar úr Wall Street, eftir at Kongressin hevur hert ymsar lógir. Higartil hevur tað kostað Wall Street sjey prosent av marknaðarpartinum, so í fjør vóru meiri pengar í umfari á London Stock Exchange enn í Wall Street.

## Misnøgdir bankar

Í vár fer Fólkatingið at broyta lógina um húsafígging, soleiðis at bankarnir fáa betri møguleikar at kappast við realkreditfeløgini um at fíggja hús og íbúðir. Men tjóðbankin hevur gjørt av, at bankarnir kunnu ikki fíggja meiri enn 70 prosent av húsavirðinum. Tað eru teir ikki nøgdir við og krevja markið hækkað til 75 prosent. Sum er hava bankarnir latið 180 mia. krónur til húsafígging, meðan realkredirfeløgini hava latið 1.300 mia. krónur.

# Hvalbingar undrast á politikarar

**Tað undrar alarar í Hvalba, at politikarar ikki seta forboð fyri at útflyta livandi tosk, tí toskurin av Føroya Banka er okkara sterkasta kort í kappingini við alarar í øðrum londum**

TOSKAALING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Vit hava leingi vitað, at toskurin av Føroya Banka veksur nógv skjótari enn allur annar toskur.

Men skulu vit tosa um at ala tosk, er júst hetta okkara allar størsti fyrimunur. At toskurin veksur skjótt ger, at tað gongur væl skjótari at ala bankatosk, enn tað tekur at ala allan annan tosk.

Og tað er okkara størsti kappingarfyrimunur afturímóti alarum í øðrum londum

Men akkurát tað, at toskurin á Føroya Banka hevur einar heilt serligar eginleikar av veksa, fær toskaalararnar í Hvalba at undrast á politiska myndugleikan.

- Tað undrar meg stórliga, at landsins myndugleikar ikki gera meiri fyri at verja toskin á Føroya Banka, so at vit í Føroyum kunnu varðveita tann kappingarfyrimun, sum bankatoskurin gevur okkum framum alarar í øðrum londum, sigur Mikkjal Hammer.

-Tað eru vakstrareginleikarnir hjá bankatoskinum, sum geva føroyingum ein heilt serligan møguleika at ala tosk framum alarar í øðrum londum.

- Høvdu vit ikki hendan fyrimunin, hevði grundarlagið undir føroyskari toskaaling verið munandi veikari, tí so er heldur ongin serligur fyrimunur at hava alibrúkini í Føroyum ístaðin fyri at leggja tey nærri marknaðinum fyri at minka um flutningskostnaðin.

Men sum støðan er nú, er tað onki, sum forðar einum skipi at taka tosk av Bankanum og føra hann livandi av landinum til alarar aðrastaðni.



Føroysk skip hava loyvi at selja 25% uttanlands, men tað er onki sum forðar teimum í at selja livandi fisk

Tí skilir Mikkjal Hammer als ikki, at politikarar ikki seta lóg í gildi, sum ger tað ólógligt at útflyta livandi tosk.

- Vit skuldu treyðugt rent okkum í bankatosk á marknaðinum, sum alarar í øðrum londum hava alt. Hendir tað, verður tað eitt stórt bakkast fyri toskaaling í Føroyum, sigur hann.

- Í bankatoskinum hava føroyingar nakað heilt serstakt og tað eiga vit at verja, leggur hann afturat.

*Skulu vit tosa um toskaaling í Føroyum, er tann serligi bankatoskurin okkara størsti kappingarfyrimunur ímóti alarum uttanlands. Tí undrar tað Mikkjal Hammer í Hvalba, at vit ikki seta tiltøk í verk at forða fyri, at at alarar uttanlands fáa fatur á honum.*

